VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

# Kunning um vinnuferð til India 19. – 25. november 2023

Løgmansskrivstovan og Vinnuhúsið skipa fyri almennari vinnuferð til New Delhi í India í døgunum 19. – 25. november. Løgmaður luttekur eisini á ferðini. Endamálið er at knýta sambond millum føroyskt og indiskt vinnulív, innan eitt nú aling, fiskivinnu, veitaravinnu, KT og gransking.

Yvirskipaður karmur um vinnuferðina er stóra ráðstevnan India Nordic Baltic Business Conclave. Luttakarar eru fyritøkur og vinnuumboð úr India, norðurlondum og baltisku londunum, og evnini fyri ráðstevnuna fevna breitt frá eitt nú Sustainability og Global Supply Chain Resilience til Blue Economy og Maritime Cooperation.

Fyri at tryggja munagóða úrtøku fyri luttakarar, verður eisini møguleiki hjá føroysku vinnufyritøkunum, at leggja til rættis B2B-fundir við indiskar fyritøkur. Indiska Vinnuhúsið (Confederation of Indian Industry) og danska sendistovan í New Delhi hjálpa føroysku fyritøkunum at finna fram til viðkomandi indiskar fyritøkur og leggja til rættis fundir við hesar.

Endalig skrá verður løgd til rættis við støði í áhugamálum hjá luttakandi fyritøkum.

## Skrá

Skráin sær fyribils soleiðis út:

19. november: Fráferð úr Føroyum.

20. november: Luttakarar lenda í New Delhi kl. 07.40 og fáa kunning á donsku sendistovuni. Seinnapartin er møguleiki fyri B2B-fundum.

21. november: Møguleiki fyri B2B-fundum. Alt eftir áhuga, verður skipað fyri vinnuvitjan í øðrum býum enn Delhi. Luttakarar koma aftur til Delhi um kvøldið.

22. november: Luttøka á ráðstevnuni India Nordic Baltic Business Conclave. Møguleiki fyri B2B-fundum.

23. november: Luttøka á ráðstevnuni India Nordic Baltic Business Conclave. Møguleiki fyri B2B-fundum.

24. november: Fráferð úr India. Luttakarar lenda í Kastrup kl. 17.50

25. november: Fráferð úr Keypmannahavn til Vágar.

## Prísur

Innleiðandi prísurin er úr kr. **19.960,-** fyri hvønn ferðandi.

Um ferðast verður til aðrar býir enn New Delhi, verður hesin kostnaður lagdur afturat. Fyritøkur hava eisini møguleika fyri sjálvar at leggja til rættis ferðaskránna.

Íroknað prísinum er:

- Flogferðaseðil Føroyar - New Delhi t/r (komfort class)
- Hotel ITC Maurya, einakamar v/morgunmati 4 nætur
- Hotel Clarion í Kastrup, einakamar v/morgunmati 1 nátt
- Bussur í samband við komu og fráferð millum flogvøll og hotel.

**Ferðaskrá**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| RC 456 | 19NOV | FAROE ISLANDS-COPENHAGEN | 1430 | 1735 |
| AI 158 | 19NOV | COPENHAGEN-NEW DELHI | 1950 | 0740+1 |
| AI 157 | 24NOV | NEW DELHI-COPENHAGEN | 1330 | 1750 |
| RC 453 | 25NOV | COPENHAGEN-FAROE ISLANDS | 1225 | 1340 |

**Praktiskir upplýsingar**

Visum: Neyðugt er at søkja um sokallað e-visa, tá ið ferðast verður til India. Vegleiðing og leinki til at søkja um e-visum er her: https://www.indianembassycopenhagen.gov.in/page/e-visa/

Koppseting: Til ber at lesa nærri vegleiðing um koppseting, tá ið ferðast verður til India á heimasíðuni hjá danska Serum Institut.

**Tilmelding**

Tilmelding fer fram við at venda sær til Sensen Travel á booking@sensen.fo

Freist fyri tilmelding er 4. oktober 2023.

Um tit hava spurningar, eru tit vælkomin at venda tykkum til:

**Vinnuhúsið**: Øssur M. Dalbúð, ossur@industry.fo / 739911

**Løgmansskrivstovan**: Pól R. Wolles, polrw@tinganes.fo / 504705